## Jón Rói í La Manga



AaB er í hesum døgum í La Manga í Spania á venjingarlegu. Jón Rói Jacobsen er nú einsamallur føroyingur í Aalborg. AaB hevur spælt tveir venjingardystir. Í fyrra dystinum, sum var ímóti norska Lillestrøm, spældi Jón Rói allar 90 minuttirnar. Dysturin endaði við javnleiki 2-2. Í seinna dystinum var Jón Rói skiftur inn í hálvleikinum, tá ið AaB var á odda 2-0. Í seinna hálvleiki gekk heilt galið hjá AaB, sum tapti dystin ímóti FC Krylya 3-2.

## B68 sjey útlendingar

B68 skal hava heili sjey útlendskar spælarar í hópinum í ár. Av teimum eru fýra spælarar úr Senegal. Tveir av hesum, Badara og Landing, hava vant í B68 í eina tíð, og fríggjadagin komu tveir afturat til Toftir. Keita er álopsspælari og Ndende er miðvallarspælari. Teir báðir vóru við í venjingardystinum hjá B68 ímóti KÍ leygardagin, men líkindini at spæla vóru vánalig, og tey mundu passa nýggju spælarunum illa – teir vóru komnir úr 26 hitastigum.

Stjørnan-VB 25-21 (11-10):

# Eingin fær nakað í Klaksvík

**Heldur ikki VB megnaði at fáa stig við sær úr Klaksvík, har Stjørnan ikki hevur mist stig í tvey kappingarár**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Stjørnan gav ongar gávur, tá VB sunnudagin royndi at betra um sínar møguleikar at røkka FM-finaluni annað árið á rað.

Eftir tapið hjá VB móti Neistanum fyri viku síðani er trýstið á VB vorðið munandi størri, og tí skuldu tær helst hava stig við sær, tá tær fóru undir truplastu hugsandi uppgávuna. Nevnliga móti Stjørnuni í Klaksvík.

VB er kanska tað liðið, sum hevur havt besta takið á Stjørnuni seinnu árini, men tað hevur verið á heimavølli, at bestu úrslitini eru komin. Á útivølli hevur ikki gingist eins væl, men sunnudagin hekk VB tó leingi heilt væl í oddaliðnum.



*Tá tær á heimaliðnum settu ferðina upp móti dystarenda, megnaði VB ikki longur at fylgja við*

*savnsmynd*

Munurin fyri steðgin var lítil og eingin, og tó at Stjørnan eftir steðgin var á odda alla tíðina, so helt spenningurin sær, til bert 10 minuttir restaðu. Tá prógvaði heimaliðið enn einaferð, at tær eru tað liðið í landinum, sum hevur størstu orkuna, og við at halda speedaranum niðri, runnutær reyðu gestirnar umkoll.

### FAKTA

**Stjørnan-VB 25-21 (11-10)**
10 min: 4-2
20 min: 6-6
40 min: 17-14
50 min: 20-17
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 8(2), Durita Christophersen 6, Joan Midjord Djordjevic 4, Bára Skaale Klakstein 3, Anna Kristina Samson 3, Durita Mikkelsen 1
**VB:** Daiva Toumaite 12(3), Svava Vestergaard 4, Monika Samuelsen 2, Una Egilsdóttir 1, Laila Jespersen 1, Christina Holm 1
**Brotskast:** Stjørnan 2, VB 2
**Útvísingar:** Stjørnan 1
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg.

KÍF-H71 26-23 (12-10):

# So vann KÍF

**Ikki síðani november mánað hevur KÍF fingið stig við sær av vøllinum, men móti H71 bragdaði sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hoyvíkingar mugu helst smyrja seg við, at teir ikki hava tað heilt stóra at spæla fyri seinastu dystirnar av kappingarárinum.

Hóast finalumøguleikin er fjarðaður burtur í mest sum einki, so hava bronsumerkini kortini verið í eygsjón, men eisini tey eru nú mest sum burtur.

Sunnudagin gjørdist H71 nevnliga bara næsta liðið, sum mátti lúta fyri KÍF í landskappingardysti.

Kollfirðingarnir hava verið púrasta sørir síðani november mánað, men sunnudagin høvdu teir so ruddiliga munin á gestunum.

Hóast teir einki hava at spæla fyri, fyrr enn ein møguligur upp – og niðurflytingardystur er á skránni móti Team Klaksvík, so vildi heimaliðið meira sunnudagin. Hóast tað nakrar ferðir stóð á jøvnum,so var tað bert fyrsta lítla korterið, at H71 hevði nøsina frammanfyri.

Spælið var kanska ikki tað besta ella ferðmiklasta. Men kollfirðingarnir spældu allan dystin skilagott. Teir stóðu væl í verjuni, og í álopsspælinum ansaðu teir eftir, at tekniskar villur ikki kostaðu kontra til mótstøðuna. Og høvdu dómararnir armin á lofti, varð dyrgt eftir tríggjametrakasti, soleiðis at Oros antin kundi høgga til sjálvur ella eisini spæla viðspælara leysan.

Teirri uppskriftini fann H71 ongan tíð nakað veruligt vápn ímóti, og tí gjørdist talan støðugt um tunga mótbrekku fyri teirra viðkomandi.

### FAKTA

**KÍF-H7 126-23 (12-10)**
10 min: 3-4
20 min: 8-7
40 min: 16-14
50 min: 20-18
**Málskjúttar**
**KÍF:** Damir Oros 8(2), Rógvi Weihe 5, Niklas Reginsson 5, Regin Petersen 3, Dean Jankovic 3, Teitur Joensen 2
**H71:** Esbern Patursson 7, Janus Sørensen 7, Dánjal Tórgarð 3, Johnny Durhuus 2(2), Gunnar Bláberg 2, Freddie Poulsen 1, Christian Eli Zachariassen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, H71 3
**Útvísingar:** KÍF 7, H71 3
**Dómarar:** Kristjan Joensen & Karstin Joensen

## Innanhýsis uppgerðirnar fyrst

**Broyttu kappingarreglurnar kunnu geva Neistakvinnum avgerandi fyrimun í dystinum um at røkka FM-finaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á næst seinasta aðalfundi vórðu kappingarreglurnar í hondbólti broyttar nakað. Ein munur eftir hetta varð, at tað nú eru innanhýsis uppgerðirnar, sum verða roknaðar fyrst, um tað stendur á jøvnum millum tvey lið í stigum.

Og tað kann væl gerast støðan, tá øll liðini í Sunset-deildini hava spælt sínar 20 dystir. Sum er, so hava Neistin og VB eins nógv stig á øðrum plássi.

Eitt hugsað scenario er í øllum førum, at Neistin tapir á útivølli móti Stjørnuni, men vinnur hinar dystirnar móti VB, Kyndli og StÍF. Um VB tá vinnu sínar dystir móti StÍF, VÍF og Kyndli, so hava bæði liðini 26 stig.

Og tað kann væl vera, at VB tá hevur betra málmunin, men tann parturin telur ikki tað stóra. Í hugsaðu støðuni hevur Neistin nevnliga vunnið tríggjar av fýra dystum móti VB, og tí eru tær tá framman fyri í dystinum um rættin til at spæla FM-finalu móti Stjørnuni.